Til Løgtingsins Umboðsmann

Eg skal við hesum kæra løgmann og landsstýrismannin í Uttanríkis- og Vinnumálum til Løgtingsins Umboðsmann fyri teirra handfaring av málinum um setan av aðalstjóra í Uttanríkis- og Vinnumálaráðnum.

Tað er mín meting, at handfaringin av hesum máli hevur verið uttanfyri alt sømuligt mark, og langt uttan fyri tað, sum er loyvt í einum rættarsamfelagi sum Føroyar.

Grundgevingar mínar fyri hesi kæru eru hesar:

1. Sambært løgfrøðilesnaði, rættarpraksis og sambært praksis hjá danska og føroyska umboðsmanninum hevur tað almenna eina treytaleysa skyldu at seta best skikkaða umsøkjaran í eitt alment starv. Hetta er eisini galdandi fyri setan av einum aðalstjóra.

2. Tað er ein rein fyrisitingarlig avgerð at seta eitt starvsfólk í starv hjá tí almenna, og hetta er eisini galdandi fyri setan av einum aðalstjóra.

3. Tað er ikki ein politisk avgerð at seta ein aðalstjóra. Politisk og onnur ósaklig sjónarmið eiga ikki at verða tikin við, tá fólk verða sett í alment starv.

4. Tað er hinvegin ein politisk avgerð at normera størv, og tá aðalstjórar skulu setast, er tað politiska skipanin sum setur upp formligu reglurnar fyri teirri setanartilgond, sum skal vera galdandi fyri starvsetanina av einum aðalstjóra.

5. Politiska skipanin hevur samsvarandi hesum orðað ein almennan starvsfólkapolitik, og tær treytir, sum skulu vera galdandi fyri tilgongdina at seta nýggjan aðalstjóra. Henda setanartilgongd skal vera við til at tryggja, at allir umsøkjarar fáa somu viðgerð, og at tað bert verða tikin saklig atlit í samband við eina starvsetan.

6. Tað er ikki undirritaði, sum hevur sett karmarnar fyri teirri setanartilgond, sum eg havi verið partur av, men løgmaður saman við landsstyrismanninum í Uttanríkis- og Vinnumálum.

7. Gongdin í hesum máli vísur, at tá ið úrslitið av teirri tilgond - sum politiska skipanin sjálv hevur sett í verk - ikki hóvaði politisku skipanini, so varð øll setanartilgondin skúgvað til viks. Ikki av sakligum orsøkum, men av øðrum ósakligum orsøkum. Løgmaður broytir treytirnar eftirfylgjandi, eftir at setanarbólkurin er liðugur við sítt arbeiði.

8. At finna tann best skikkaða persónin til eitt aðalstjórastav krevur altíð eina ítøkiliga meting. Metingin skal vera saklig, men hon skal taka støði í teimum kvalifikatiónum, sum eru settar sum krøv í starvslýsingini, og teimum persónligu eginleikunum sum viðkomandi umsøkjarar hava.

9. Í samband við setanina av aðalstjóra í Uttanríkis- og Vinnumálaráðnum valdi landsstýrið ta mannagongd, at setast skuldi ein setanarbólkur at meta um innkomnu umsóknirnar. Í hesum setanarbólki hava sitið fleiri av hægstu embætismonnum landsins, við sjálvum løgmansstjóranum sum formanni í setanarbólkinum. Hertil kemur, at setanarbólkurin eisini hevur keypt sær eksterna serfrøði til at meta um kvalifikatiónirnar hjá umsøkjarunum.

10. Sum skjølini í málinum vísa, havi eg verið til fleiri setanarsamrøður, og eg havi verið til samrøðu hjá eksterna serfrøðinginum, sum setanarbólkurin hevur sett til endamálið.

Avrit frá kvf.fo

Niðurstøðan hjá setanarbólkinum er púra greið: Ein samdur setanarbólkur er av teirri áskoðan, at eg eri einasti “serstakliga væl skikkaði” persónurin til starvið.

11. Eftir øllum at døma, hóvar henda innstilling ikki landsstyrismanninum í Uttanríkis- og Vinnumálaráðnum, sum í notati til løgmann setur seg ímóti, at undirritaði verður settur í starvið.

12. Verður notatið hjá landsstýrismanninum lisið samanhangandi er eingin ivi: Landsstýrismanninum dámar ikki meg sum persón. Landsstýrismaðurin roynir at geva sína meining til kennar við “sakligum” argumentum, men tað eydnast ikki landsstýrismanninum at halda seg til sakligu argumentini, so mangt annað – púra óviðkomandi – verður eisini tikið við til tess at “undirbyggja” hansara niðurstøðu.

13. Landsstýrismaðurin heldur, at undirritaði er ógegnigur at vera aðalstjóri, tí eg eri í familju við ymiskar persónar, sum luttaka í føroyska vinnulívinum, og at hetta ógegni eisini ger seg galdandi í samband við mítt fyrrverandi starv sum ein av stjórunum fyri BankNordik.

14. Viðvíkjandi spurninginum um gegni er at viðmerkja, at talan er um eitt løgfrøðisligt hugtak. Spurningurin um gegni skal ikki viðgerast á politiskum stigi, tí spurningurin um gegni byggir á kendar lógarreglur.

15. Setanarbólkurin hevur fingið allar upplýsingar um míni vinnuligu sambond, og hevur ikki mett, at mítt gegni er nakar trupulleiki. Eg havi ongi fíggjarlig áhugamál í Bakkafrosti. Eg havi greitt setanarbólkinum frá øllum mínum viðurskiftum og ein samdur setanarbólkur hevur ikki mett, at spurnartekin kunnu setast við mítt gegni.

16. Harumfarmt hevur landsstýrismaðurin nakrar viðmerkingar um mín persón sum bæði eru ósannar og niðurgerandi.

17. Eitt er, at eg skal vera frávaldur sum stjóri fyri BankNordik. Hettar er beinleiðis ósatt.

18. Eitt annað er, at landsstýrismaðurin í sínum privata virki skal hava ringar royndir av mínum persóni. Her skal upplýsast, at eg ikki veit um nakað samband millum meg og landsstýrismannin, burtursæð frá, at eg fyri 21 árum síðani arbeiddi ein ella tveir mánaðar á Føroya Fiskasølu, tá landsstýrismaðurin var stjóri fyri hesa fyritøku. Eg havi onki samband havt við landsstýrismannin sum stjóri fyri BankNordik.

19. Tað er eisini ósatt, at eg eri heftur av BankNordik. Eg havi ongar bindingar mótvegis bankanum ella teimum kundum, sum bankin hevði. Hevði eg havt nakað tilknýti til kundar bankans, hevði eg snøgt sagt ikki kunna verið stjóri fyri bankan.

20. Elektroniska dataskipanin hjá BankNordik og føroysku peningastovnunum var løgd til ein danskan datacentral, langt áðrenn eg gjørdist stjóri fyri BankNordik, og landdstýrismaðurin veit, at eg onki havi havt við hesi viðurskifti at gera.

21. Tað er heldur ikki rætt, tá landsstýrismaðurin í sínum notati vil vera við, at eg sum aðalstjóri skal “tæna politisku skipanini”. Sum aðalstjóri skal eg tæna almennu umsitingini, og spuringurin um hvør er aðalstjóri eigur ongantíð at vera ein politiskur spurningur, tí landsstýrismenn sita vanliga í eitt avmarkað tíðarskeið, meðan aðalstjórastarvið er lýst leyst sum eitt tænastumannastarv uttan tíðaravmarking.

22. Eru sjónarmiðini hjá landsstýrismanninum røtt, verður avleiðingin, at ein landsstýrismaður í samband við skipan av nýggjum landsstýri eisini hevur rætt til at siga sitandi aðalstjóran úr

Avrit frá kvf.fo

starvi. Kann landsstýrismaðurin nokta at seta ein persón í starv, sum honum ikki dámar, so kann landsstýrismaðurin eisini uppsiga einum aðalstjóra, sum honum ikki dámar.

23. Tað er eingin løgfrøðisligur munur á treytunum fyri, hvussu handfaringin av einum setanarmáli og uppsagnarmáli skal fara fram. Tað skulu somu sakligu sjónarmið liggja til grund í báðum førum.

24. Setanartilgongdin í samband við setan av aðalstjóra er væl kend í Føroyum. Hettar hevur verið mannagogndin í samband við so at siga allar setanir av leiðandi embætisfólkum í Føroyum. Skipanin er upprundaliga sett í verk, júst fyri at halda politisku skipanini burtur frá starvsetanum.

25. Júst av hesum orsøkum hevur eisini í okkara grannalondum verið frammi, at ráðharrar kanska áttu at havt sín serliga ráðgeva, sum verður settur saman við ráðharranum, og sum so eisini verður loystur úr starvi, tá viðkomandi ráðharri fer úr starvi.

26. Fleiri mál úr m.a. Danmark hava víst, at ein aðalstjóri hevur síni egnu rættindi og hevur egna ábyrgd í sínum starvi. Tamilsakin vísir greitt, at ein aðalstjóri ikki hevur skyldu at fylgja politiskum boðum frá einum ráðharra, men at aðalstjórin tvørtur ímóti hevur skyldu til at siga frá, um hann metir, at ráðharrin fer út um sínar heimildir. Tamilmálið vísir eisini, at aðalstjórin ífellur ábyrgd sum embætismaður, um hann til dømis fremur ólógliga umsiting eftir boðum frá einum ráðharra.

27. Tað er tí av stórum týdningi, at politiska skipanin virðir rættindini hjá einum aðalstjóra. Ein aðalstjóri eigur at hava rætt til at arbeiða sjálvstøðugt, tí aðalstjórin hevur sjálvstøðuga ábyrgd.

28. Ein aðalstjóri skal hinvegin vera loyalur móti sínum landsstýrismanni, og hann skal syrgja fyri at hjálpa landsstýrismanninum, soleiðis at hann ikki kemur illa fyri, orsakað av sínum politisku ætlanum. Aðalstjórin skal sostatt eisini virða landsstýrismannin og hansara politiska vilja.

29. Um sjónarmiðini hjá løgmanni eru røtt, at hann uttan nakra veruliga málsviðgerð, og uttan nakra veruliga grundgeving kann skúgva til viks eina setanartilgond, sum løgmaður sjálvur hevur sett í verk, so er vandi fyri, at politisk atlit í størri mun fara at gera seg galdandi í framtíðini, tá leiðandi embætisfólk verða sett í starv.

30. Tað er mín áskoðan, at føroyskir politikarar sum heild ofta hava torført at virða embætisverkið. Føroyskir politikarar seta, í alt ov stóran mun, dagskránna í umstingarligum málum. Trýstið frá føroyskum politikarum ímóti føroyska embætisverkinum er so stórt, at hetta kann hava við sær, at vit við tíðini fáa eitt veikt embætisverk.

31. Gongdin júst í hesum máli vísir, at føroyskir politikarar heldur ikki virða niðurstøðurnar hjá Løgtingsins Umboðsmanni, tí øll eru vitandi um, at Løgtingsins Umboðsmaður hevur úttalað, at tað skulu sera tungtvigandi orsøkir til, fyri ikki at fylgja einum tilmæli frá einum samdum setanarbólki.

32. Tað gera seg júst somu viðurskifti galdandi í hesum máli, sum í øðrum líknadi málum, nevniliga, at politiska skipanin í staðin fyri saklig atlit, tekur politisk atlit, og setur tey fólk í starv, sum viðkomandi politikari vil hava sett í starvið, hetta uttan at nøkur saklig málsviðgerð yvirhøvur er farin fram í sambandi við frávalið at fylgja einum setanarbólki.

Avrit frá kvf.fo

33. Eg loyvi mær at ganga út frá, at Løgtingsins Umboðsmaður ikki hevur broytt støðu i mun til onnur líknadi mál, og at umboðsmaðurin samsvarandi hesum fremur eina skjóta málsviðgerð.

Vinarliga

John Rajani

Avrit frá kvf.fo